gult18 cyan18 magenta18 svart18



## ÚT AT KOYRA

# Konsert undir havsins botni

**Mánadagin 30. apríl klipti norski kongurin, Harald V, snórin til "Trekantsambandet", sum er størta norska verkætlan aftaná Gardermoen lufthavnina. 29. november í fjør, var ein konsert hildin í undirsjóvartunnilinum niðri á 260 metrum**

TUNNLAR
*Magnus Gunnarsson*

Ætlanin um at binda oyggjarnar Stord, Føyno, Nautøy, Spissøy og Bømlo saman við tveimum stórum heingibrúgvum, einari vanligari stoyptari brúgv, og einum undirsjóvartunnli inn á fastlandið, nakað norðanfyri Haugesund, varð samtykt av stórtinginum í 1996. Byrjað varð á várið 1997. Byggitíðin varð mett til fýra ár, og prísurin mettur til umleið 1.8 milliardir norskar krónur
.

### 1.85 milliardir

Bæði tíðarætlanin og fíggjarætlanin hava hildið. Nú hava hesar oyggjarnar við sínum 30.000 íbúgvum, sum hava verið størsta oyggjasamfelag í Norra, ið ikki hava havt vegasamband til fastlandið, fingið brúgvar og tunnlar fyri 1,85 milliardir krónur. Hetta hevur havt við sær at fýra ferjusambond verða niðurløgd. Tunnilin er 7.860 metrar langur og er sostatt longsti undirsjóvartunnil til bilaferðslu í Europa.

### Konsert í tunnlinum

29. november í fjør, vóru fleiri hundrað fólk savnaði í tunnlinum, niðri á 260 metrum, har ymisk kór frá Bømlo, Stord, Sveio og Haugesund høvdu eina óvanliga konsert, áðrenn tunnilin varð latin upp fyri almennari ferðslu. Møguliga verður okkurt áhugavert tiltak undir Vestmannasundi, áðrenn Vágatunnilin verður latin upp.

*Kelda: Bømlo Nytt*



*Konsert í longsta undirsjóvartunnli til bilaferðslu í Europa. Á myndini síggjast bussar sum komu við fólkum til konsertina. Tað hevði kanska verið eitt gott hugskot at havt okkurt tiltak í Vágatunnlinum áðrenn hann verður latin upp*

## Trafic og Vivaro



Í heyst koma tveir nýggir vørubilar á marknaðin. Talan er um Opel Vivaro og Renault Trafic, ið eru næstan eins, og verða gjørdir á eini fyrrverandi Vauxhall og Bedford verksmiðju í Luton í Onglandi.

*Kelda: Motor Magasinet*

## 5 mill. Punto



Síðan Fiat Punto kom á marknaðin í 1993, eru nú framleiddir 5 milliónir bilar. Frá 1971 til 1983 vóru framleiddir 5.3 milliónir av Fiat 127. Rekordina setti Fiat Uno, sum varð framleiddur í 6.3 milliónum eindum frá 1983 til 1996.

*Kelda: Inside Fiat nyhedsbrev*

# Chrysler Voyager – nú í fjórðu generatión

**Íbirtarin av MPV-bilunum, Chrysler Voyager, kemur nú í nýggjari útgávu, sum er fjórða generatión**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tað var Chrysler Voyager sum í 1984 legði grundstøðið undir MPV-bilunum. MPV stendur fyri "Multi Purpose Vehicle" ella á donskum"Altmuligbilen" Teir fyrstu Voyager vóru ein einføld og praktisk konstruktión, har sera avmarkað var við koyrieginleikar og trygd.

### Góðan dieselmotor

Nú eru koyrieginleikarnir og trygdin á høgum støði, og nýggi Voyager er ein heilskapaður bilur sum fæst við 4 og 6 syl. motorum. Fólk frá FDM, ið hava royndarkoyrt fleiri av bilunum, siga at tann nýggi 4 syl. torbodiesel motorurin við commonrail-innspræning, roynist væl, hevur góða kraft, og er sera orkusparandi.

*Kelda: FDM / Motor*



*Nýggjasta útgávan av Chrysler Voyager, bilurin sum legði grundstøðið undir MPV bilunum*




gult19 cyan19 magenta19 svart19



# ILA fær frið í Funningsfirði

**Hóast ILA-sjúka í Funningsfirði mundi fingið løgtingið at leggja uppí verkfallið, verður einki slakt av sjúkum fiski har næstu dagarnar. Einki virki er at taka ímóti sjúka fiskinum**

ILA
*Eyðun Klakstein*

Støðan við ILA-sjúkuni í Funningsfirði var undir verkfallinum mett at verða so álvarsom, at løgtingið mundi at lagt uppí.

Men hóast verkfallið er av, hendir einki við sjúkuberjingini í Funningsfirði komandi dagarnar.

Orsøkin er, at einki virki er klárt at taka ímóti sjúka ILA-virkinum úr Funningsfirði, og tí ganga fleiri dagar afturat, áðrenn nakar fiskur verður tikin í Funningsfirði.

Í løtuni arbeitt við at gera virkið á Strondum, sum Funningslaks eigur í, klárt til slaktið.

– Tað verða sett stór krøv til slakt av sjúkum fiski, og tí mugu nógv fyrilit takast, áðrenn vit sleppa at taka fiskin. Vit fingu einki gjørt við hetta undir verkfallinum, og tí dregur slaktið út. Vit rokna við at fara undir at taka fisk síðst í hesi vikuni ella fyrst í komandi viku, sigur Kári Nielsen, stjóri á Funningslaks.

– Hetta er sera óheppin støða, tí tað doyr nógvur fiskur av sjúku, og tað er umráðandi at fara undir at taka fiskin sum skjótast, sigur hann.

### Hevur stóran skund

Vestsalmon fór í gjár undir at slakta fisk í Oyndafirði, har ILA eisini er staðfest, og hetta slaktið fer fram á virkinum í Oyndafirði. Hetta virkið hevur áður slakta fisk fyri Funningslaks, men tað kann tað ikki í løtuni, tí har er ovmikið at gera.

– Tað er umráðandi, at fiskurin verður tikin sum skjótast bæði í Oyndarfirði og í Funningsfirði, men eg kann sum so ikki áleggja feløgum at slakta fiskin, tá umstøðurnar ikki eru til tað, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni.

– Tað doyr framvegis nógvur laksur í Funningsfirði, og heldur hetta fram, so sigur tað seg sjálvt, at so verður skjótt eingin livandi fiskur eftir har, sigur hann.

## Clickhaze útikonsert

TÍÐINDASKRIV
*Plátufelagið Tutl*

Fríggjakvøldið 1. juni verður mentanarnátt í Havn. Hetta er tiltak, sum kunningarstovan í Havn samskipar, og á skránni er m. a. ein útikonsert við Prix Føroyar vinnaranum Clickhaze. Tað er Plátufelagið Tutl, sum skipar fyri hesi konsert, sum verður á Vaglinum í gamla kommunuskúlagarðinum í Havn fríggjakvøldið kl. 23.00.

Sigast kann, at bólkurin Clickhaze »klikkaði seymin beint á heysin«, tá hann í eini sera spennandi og javnari Prix Føroyar kapping í Norðurlandahúsinum gjørdist nummar eitt, og vunnu eina ferð í upptøkuhøli og luttøku á Nibe Festivalinum í Danmark.

Bæði áhoyrarar og dómarar vóru rættuliga samdir um, at Clickhaze hevði eina egna framførslu á høgum støði. Við Eivør Pálsdóttir og Petur Jensen á odda er altíð spennandi bæði at hoyra, men eisini at síggja Clickhaze á palli. Og hetta høvi fáa vit, sum sagt, longu nú fríggjakvøldið.

Tey sum manna Clickhaze eru: Jón Tyril (guitar), Bogi á Lakjuni (guitar), Jens L. Thomsen (bass), Høgni Lisberg (trummur), Mikael Blak (keyboard), Bjarti S. Hansen (ljóð), Petur P. Jensen (sang) og Eivør Pálsdóttir (sang).

# Føroyar og Kyoto

OLJA OG CO2
*Regin Joensen*

Sum einasta samfelag í Norðurlondum eru tað Føroyar, ið ikki vilja undirskriva Kyoto-avtaluna. Sjálvt um Føroyar eisini er tað samfelag, ið vil kenna stórsta sviðan, um Kyotoavtalan verður av ongum. Kyotoavtalan er bara ein byrjan fyri at taka ábyrgd av útlátinum av veðurlagsgassum í atomsferðina, men hon er eitt neyðugt stig á rættari leið.

Lívsgrundarlagið í Føroyum er fiskivinnan, og fiskivinnan vil koma at merkja stórstu negativu ávirkan av útlátinum av veðurlagsgassum – av tí at Føroyar liggja landafrøðisliga millum tann heita Atlantarshavssjógvin og tann kalda pólsjógvin, og hetta markið er grundarlagið undir føroyskari fiskivinnu.




Við økingini av veðurlagsgassum vil gerðin av djúphavssjógvi minka við tað at pólurin smeltar og sjógvurin verður feskari, og á tann hátt missur tann fysiska eginleikan, ið vil ávirka dragið á Atlantarhavssjógvin á tann hátt, at sjógvurin rundan um Føroyar verður kaldari, og harvið minka um grundarlagið fyri fiskivinnu og aling í føroyskum sjógvi.

Men oljuvinnan hevur sjálv funnið út av, at CO2 er vorðið ein resursur í útvinning av olju, tí oljuvinnan kann nýta CO2 sum hjálp í útvinning av olju úr undirgrundini, við at pumpa CO2 niður aftur í oljubrunnin og harvið økja trýstið í brunninum, og tann hátt fær pumpað enn meira olju úr hvørjum brunni. Og hetta er ein tøkni, ið longu er í nýtslu á oljufeltunum í Norra og í Danmark. Sum dømi hevur Siri borpallurin í donskum øki minkað CO2 útlátini í apríl í ár úr 25000 m3/dag til 300 m3/dag.

Men henda tóknin varð fyrst tikin í nýtslu á Sleipner økinum, hvar CO2 innihaldið í gassinum var 9% og mátti minkast niður í 2,5%, áðrenn gassið kundi seljast, og avgjørt varð at pumpa CO2 1000 m niður í undirgrungina. Tí skuldi Kyotoavtalan ikki verið til hindurs fyri eini oljuvinnu í Føroyum, men heldur ein møguleiki fyri eini vinnu, sum tekur ábyrgd av sær sjálvari, og sum upp á longri sikt við nýtslu av gasskraftverkum á landi vil koma at minka um CO2.

# Fiskimálaráðharrar í Norðuratlantshavi hittust

TÍÐINDASKRIV
*Fiskimálastýrið*

Tann sætti fundurin millum fiskimálaráðharrar í Norðuratlantshavinum verður hildin í Stenungsbaden í Svøríki í hesum døgum frá 28 til 30 mai 2001. Fiskimálaráðharrar úr Kanada, Íslandi, Føroyum og Noregi eru við á fundinum. Úr Russlandi luttekur formaðurin í fiskivinnunevndini og úr ES luttekur fiskivinnukommiserurin. Eisini luttaka embætisfólk á høgum stigi úr øllum londunum.

Á fundinum hesaferð vóru høvuðsevnini grønbókin hjá ES sum upplegg til nýggjan fiskivinnupolitikk, ætlanir um fiskivinnupolitikk í Russlandi, ein nýggj endamálsrættað fiskivinnustýring í Kanada og landingar í fremmandum havnum og útblaking av fiski sum heild.

Haraftrat hava ráðharrarnir viðgjørt broytingar, sum verða gjørdar í hvørjum landi sær, grundað á nýggjar stýringshættir, tá talan er um flølbroyttar fiskastovnar og vistskipan. Ráðharrarnir løgdu serliga dent á støðuga endurnýggjan av fiskastovnum og vistskipan, betri kanningar og neyvleika í ásetingini um fiskastovnar, betri medvitan frá fleiri tilfeingishavarum og betri eftirlit við fiskiskapi, niðurskurð í veiðiorku við atliti at tilfeinginum í sjónum, at størri dentur verður lagdur í búskaparligan burðardyggleika eisini hjá alivinnuni, fiskiskap við ábyrgd og at menna arbeiðið, sum verður gjørt í millumlanda felagsskapum og –nevndum.

Fiskimálaráðharrarnir umrøddu mál av felags áhuga sum vaksandi handil við fiski og fiskavørum og avleiðingar á tilfeingið, herundir sambandi millum altjóða umhvørvismál og altjóða fiskiveiðiavtalur. Teir viðurkendu, at fyri vistskipanina í havinum er neyðugt at ansa fiskastovnum á einum burðardyggum støði eisini við atliti at øllum tilfeinginum, herundir hval og kóp.

Ráðharrarnir undirstrikaðu týdningin av, at settir verða upp málrættaðir stýringsformar, sum hava til endamál at tryggja burðardygga menning í fleiri stovnum í longri tíðarskeið, og at úrslitið verður í tráð við endamálini og fyri øll, sum starvast í fiskivinnuni. Semja er um, at størri dentur má leggjast á at forða fyri, at fiskur fer fyri borð aftur, og tað, at ikki allur fiskur verður avreiddur. Útblaking fer fram, hóast nógv tiltøk verða gjørd til tess at forða hesum. Avgjørt varð at seta ein serfrøðingabólk at koma við einum tilmæli til komandi ársfund í 2002, sum verður í Russlandi.

Frá føroyskari síðu varð áherðsla løgd á, at fiskidagaskipanin hevur nógvar fyrimunir, og kann brúkast til tess at betra um nógvar av teimum trupulleikum, sum eru hjá hinum londunum, og til tess at stýra fiskiskapinum innanfyri egnu sjómørk. Víst var á, at tá tað snýr seg um stýring av fleiri fiskastovnum, so er eisini fiskidagaskipanin ein góð skipan. Til tess at verja fyri útblaking er fiskidagaskipanin væl betri hóskandi enn aðrar skipanir. Frá føroyskari síðu varð eisini gjørt vart við stýringina av ferðandi fiskastovnum, tí hóast tað verða ásett tilvísingarmørk og veiðiætlanir, so eru fleiri lond um at gera slíkar semjur og at ov stór veiðiorka er ein stórur trupulleiki hjá teimum flestu londunum. Eisini varð dentur lagdur á týdningin fyri tey veiðisamfeløg, sum búskaparliga bert hava fiskivinnu sum høvuðsvinnu og tað neyðuga í, at eisini hetta verður tikið við, tá tilvísingarmørk verða ásett.